# nunum gullið

ur varð stungin inn um verjuna.

Men enn tóktist HB at hava fult tamarhald á. Heilt fram til 63. minutt, var meistarakósin vís, men so hendi tað, sum ikki mátti henda. Hallur Danielsen,s um spældi sín seinasta dyst á besta HB-liðnum, stútaði bóltin fyri føturnar á Allani Mørkøre, og so gjørdi veteranurin skjótt av. Báolturin varð hamraður flatt í kassan, og so tendraði B36 av álvara. Teir søktu oman móti HB-málinum, og tó at talan ikki gjørdist um opnar møguleikar, so tóktist greitt, at javnvágin í dystinum enn einaferð var koppað.

Og HB'arnir vóru enn ikki lidnir við gávugevingina. Eftir at Alaln Mørkøre hevði smekkað flatt innlegg inn um HB-verjuna, megnaði Hans á Lag bara at skumpa bóltin út til Fróða Benjaminsen, og hann hevði ikki stórvegis trupulleikar, tá bólturin varð smekkaður í kassan.




*Talan var um høgan intensitet gjøgnum allan dystin. Her er tað Jákup á Borg, sum fær eina harða tackling frá Klæmint Matras*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Verjan helt enn einaferð

Og so var tað B36, sum var á meistarakós. HB royndi at fremja broytingar av ymsum slag. Hans á Lag varð sendir niðan í álopið, og framrættaðar útskiftingar vórðu eisini gjørdar, men teir fingu ongantíð veruliga møguleikann, sum kundi sent teir aftur í dystin.

B36'arnir offraðu seg av øllum hjarta. Bæði Mikkjal Thomassen og Bergur Midjord máttu skiftast út við krampum í leggjunum, og hóast aðrir helst eisini kendu tað á sama hátt, so stríddust teir víðari. Eitt langt suff mundi fara um alt B36-húsið, tá fýra minuttir vórðu lagdir afturat leiktíðini, men talvan segði tað sama. 2-1 til B36, sum við sigrinum kom upp á 54 stig, og tað er nóg mikið til gullið.

Og skal takast saman um árið, so slepst illa undan, at gullið er so hampuliga væl uppiborið. Hóast fleiri hava hildið, at liðið ikki skjýtur nóg nógv mál, so hevur talan fyrst og fremst verið um eina óhugnaliga sterku verju, sum saman við Jákup Mikkelsen í málinum bert hevur latið 17 mál inn í 21 dystum. Júst hetta hevur helst verið sterkasta síðan hjá B36 í ár. Teimum hagtølunum hevur einki annað lið verið í nær námind av, og hetta er eisini fremsta orsøkin til, at B36 bara tríggjar ferðir í ár noyddist av vøllinum sum tapri. Hvørja ferð við teprum 0-1 tapi.



*Og so var gullið heima. Áskoðarar og spælarar tustu inn á vøllin, tá dysturin varð blástur av, og sum vera man, var fagnaðurin ovurstórur*

# Málskjúttin



*Fróði Benjaminsen hevur júst sent bóltin í HB-meskarnar, og so so kunnu bæði spælarar og viðhaldsfólk frøast*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Sum match- og FM-vinnari var Fróði Benjaminsen sjálvandi í fokus, tá FM-brakið í Gundadali var av. Heilt ítøkiliga, so var tað málið hjá Fróða Benjaminsen, sum skilti partarnar, og sjálvur seði hann seg ikki ivast, tá bólturin datt fyri føtur hansara.

- Hasin skuldi bara inn. Tað ivaðist eg ikki í, so eg smekkaði bara til.

Tað var annars ein ordiligur niðurtúrur, sum tit fáa beint fyri steðgin?

- Vit trýstu teir heilt nógv, og vit skapa eisini einar tríggjar risa-møguleikar. So sjálvandi var tað súrt, at teir skuldu skora beint fyri steðgin.

Og hvat tosaðu tit so um í hálvleikinum?

- Vit vóru samdir um, at vit høvdu verið nógv betra liðið í fyrra hálvleiki, so vit skuldu halda fast um tað sama. Sjálvandi máttu vit kanska satsa eitt sindur meir, men vit trúðu alla tíðina upp á møguleikan.

Og eftir eitt langt kappingarár. Er tað so rætti meistarin, sum nú stendur við gullinum?

- Ja, tað haldi eg. Eg haldi, at vit hava spælt væl í alt ár. Kanska hava vit ikki skorað so nógv, men vit hava verið støðugir, og vit hava arbeitt sera væl alla tíðina. Tað er kanska eitt sindur løgið, at eitt lið, sum er meistari, ikki hevur havt nakran lættan dyst, men vit hava stríðst av øllum alvi hvørjaferð, og tað hevur so givið úrslit, staðfesti gylti málskjúttin at enda.

**-mørk**

# Dýr mistøk

Hesa ferð mátti hann standa og hyggja at, meðan aðrir tókku sær av steypi og gullkrónum.

Rúni Nolsøe, sum leygardagin spældi sín seinasta dyst fyri HB, hevur annars trý ár á rað verið maðurin, sum hevur tikið ímóti FM-steypinum. Men tó at hann og HB aftur hesa ferð vóru við í stríðnum til tað seinasta, so mátti hann ásanna, at hesa ferð gekk ikki sum ætlað.

- Nei, tað gjørdi tað ikki, og tað má man so taka við. Fyrra hálvleik vóru vit øgiliga trýstir, men vit klára kortini at standa ímóti. Eftir steðgin gera vit so tvær fadesur í verjupartinum, og tað kostar.

Tað sá annars út til, at tit høvdu fult tamarhald á støðuni eftir steðgin?

- Vit spældu fínt, og vit høvdu fullkomuliga tamarhald á støðuni. Tað er keðiligt, at tað skuldi broytast soleiðis, men tað er so tað. Nógv annað er ikki at siga um tann partin nú, helt HB-liðskiparin í løtunum eftir dystin.

**-mørk**